

*Trúgva áskoðarafjøldin hjá FCK, sum her heiðrar Toda Jónsson og liðfeløgum hansara á Ráðhúsplássinum, vendi mikukvøldið sínum monnnum bakið og bríksladi teir av vøllinum eftir lemjandi 0-5 ósigurin fyri slovenska NK Gorica*
*savnsmynd*

# Ov nógvir spælarar í FCK

**Fullkomuliga óvæntaða stórtapið mikukvøldið sendi FCK úr altjóða fótbólti, og harvið eru uppgávurnar og avbjóðingarnar burtur, sum nýggju stuðulsspælararnir vórðu ætlaðir at vera við til at loysa og lyfta**

SKELKAÐ ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Tað var orduliga dagen der på í FCK í gjár. Undan púra óvæntaða stórtapinum á heimavølli ímóti slovenska NK Gorica ásannaði leiðslan í felagnum, at teir so smátt vóru farnir undir fyrireikingarnar til stóru avbjóðingina, sum tað roknaðist at verða næstu vikurnar í triðja innleiðandi umfarinum í meistarakappingini at spæla ímóti Monaco.

Í FCK høvdu teir roknað uttan at taka slovenska NK Gorica við í metingina. Slovenska liðið klæddi mikukvøldið FCK fullkomuliga av í Parkini. Teir vunnu 5–0, teir kundu havt vunnið uppaftur meiri, og nú eru tað teir og ikki FCK, sum komandi mikudag á heimavølli skulu taka ímóti Monaco.

Tað er væl skiljandi, at teir í FCK bæði hava fíggjarligar og ítróttarligar timburmenn. FCK er framvegis nógv best konsolideraða fótbóltsfelagið í Danmark. Men tað fer at svíða, at ongar inntøkur fara at fáast frá heimadystinum ímóti Monaco og møguligu dystunum í bólkaumfarinum ella í UEFA Cup.

Ítróttarliga er sviðin ikki minni. Í summar hevur felagið keypt fleiri spælarar. Onkrir teirra hava kostað nógv, og teir fáa ivaleyst stóra løn. Felagið hevur ikki dult, at spælararnir eru keyptir fyri at styrkja um møguleikarnar í europeisku meistarakappingini. Floppið, sum avrikið ímóti NK Gorica verður skýrt, ber við sær, at europeiska avbjóðingin hjá FCK er av á hesum sinni. At teir mistu meistarakappingina á gólvið, áðrenn teir komu í triðja umfarið, ber við sær, at teir eisini mistu atgongumerkini til UEFA Cup.

Syndarliga støðan letur ivaleyst upp fyri møguleikanum, at FCK fer at umhugsa at sleppa sær av við onkrar spælarar. Fyri tveimum vikum síðani segði venjarin, Hans Backe, at teir ætlaðu at lata spælararnar skiftast um at spæla fyrstu mánaðirnar í nýggja kappingarárinum. Nógvu dystirnir fóru at bera við sær, at tað fór at gerast ov strevið hjá teimum somu at spæla hvørja ferð, og tað fór at síggjast aftur seinni í kappingarárinum, um summir ikki høvdu fingið neyðugu dystarvenjingina, meðan aðrir fóru at verða moyrir og kanska skaddir.

Nú verða dystirnir brádliga nógv færri. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað er ikki neyðugt at skifta so nógv út. Harvið kann hugsast, at FCK skjótt fer at lúka í hópinum. Hvørjir fara at verða seldir, og hvagar teir skulu seljast, hevur einki enn verið at hoyrt um.

**Eingin svongd**

Í FCK og ikki minst í donsku pressuni rannsaka teir avrikið ella rættari tað, sum skuldi havt verið eitt avrik, men sum gjørdist til einki. FCKarnir stíddust ikki, teir vóru ikki í nærdystum, teir vóru tungir í verjuni, og á miðvøllinum var eingin formaður, sum kundi stýra og lyfta liðfeløgunum.

Todi Jónsson var ikki millum teir fyrstu ellivu. Hann kom á vøllin, tá ið ein lítil hálvur tími var eftir, tá ið Álvaro Santos noyddist at taka seg aftur orsaka av skaða. Hvørki undan ella eftir, at Todi var komin á vøllin, hevði FCK álopið líkinda møguleikar at gera mál.

FCK venjarin, Hans Backe, og hansara menn vórðu eyðmýktir. Annars trúgvu áskoðararnir vendu teimum baki og bríksladu teir av vøllinum.

Eftir dystarlok staðfesti venjarin, sum týsdagin hevði peikifingurin á lofti um, at uppgávan fór at verða torfør og vandamikil, at einki kemur av sær sjálvum, og hann segði seg ongantíð áður hava verið so vónbrotnan í fótbólti:

– Okkara spælarar hava seinastu árini vunnið nógv. Tað ber tann vandan við sær, at svongdin eftir at vinna meiri og harvið hugburðurin til at arbeiða tað, sum krevst, ikki er so stór. Soleiðis upplivdi eg hetta, ásannaði venjarin. Hann og spælararnir høvdu nýtt nógva tíð og orku at fyrireika seg, eftir at teir á útivølli høvdu vunnið 2–1, og harvið høvdu ella rættari hildu seg hava annað beinið í triðja umfarinum.

Pressan undrast yvir, at botnstøðið hjá FCK vísti seg at vera so lágt, sum tað var mikukvøldið. Pressan hevði eisini hug at klikkja inn á venjaran og uppleggið hjá honum. Slovenska liðið er meistari í kontraspæli. Tá ið FCK hevði fólkið frammarlaga á vøllinum og tóktist leggja lítið í verjupartin, var tað matur fyri slovenararnar, og teir tóku av. Fimm ferðir fingu teir mál, og teir kundu havt skorað uppaftur fleiri ferðir.

Í gjár hittust teir í FCK aftur. Tá fóru teir undir fyrireikingarnar til landskappingardystin leygardagin ímóti Viborg. Sárini eru nógv, og brekkan er brøtt og harvið tung, áðrenn FCK aftur hevur møguleika at royna seg í altjóða høpi.

### Dystirnir í 3. umfari av Champions League

NK Gorica, Slovenia - Monaco, Frakland.

Graz AK, Eysturríki - Liverpool, Ongland.

Juventus, Italiia - Djurgården, Svøríki.

Ferencvaros, Ungarn - Sparta Prag, Kekkia.

Rosenborg, Noreg - Maccabi Haifa, Ísrael.

Bayer Leverkusen, Týskland - Banik Ostrava, Kekkia.

CSKA Moskva, Russland - Rangers FC, Skotland.

Shakhtar Donetsk, Ukraina - Club Brügge, Belgia.

Dynamo Kijev, Ukraina - Trabzonspor, Turkaland.

Røde Stjerne Beograd, Serbia og Montenegro - PSV Eindhoven, Holland.

Dinamo Bukarest, Rumenia - Manchester United, Ongland.

Basel, Sveiss - Inter, Italia.

Benfica, Portugal - Anderlecht, Belgia.

Deportivo La Coruna, Spania - Shelbourne, Írland.

PAOK Salonika, Grikkaland - Maccabi Tel Aviv, Ísrael.

Wisla Krakow, Polen - Real Madrid, Spania.

**Fyrru dystirnir verða leiktir 10. ella 11. august, og seinni dysturin verður antin 24. ella 25. august.**



# Enn eitt pláss eftir hæli

**Nú eru seks pláss millum Føroyar og Malta, sum kemur henda vegin um knappar tvær vikur**

ALTJÓÐA STYRKISLISTIN
*Jóannes Hansen*



*Henrik Larsen, landsliðsvenjari, fer í næstum at úttaka landsliðshópinum, sum 18 august skal dystast við Malta*

Tað hevur leingi gingið stútt skeiva vegin hjá Føroyum á FIFA styrkislistanum. Í fyrradagin var listin fyri august kunngjørdur, og sambært honum er kósin hjá Føroyum framvegis lítið hugalig. Føroyar eru nummar 137 og harvið eitt pláss niðari enn í juli. Síðani undan ársskiftinum hevur fallið verið ellivu pláss, og síðani Føroyar fyri nøkrum árum síðani vóru so ovarlaga sum hvørki fyri ella síðani, hevur fallið verið út ímóti tredivu plássum.

Mikudagin 18. august skulu Føroyar spæla á heimavølli ímóti Malta. Á nýggja listanum er Malta styrkismett sum nummar 131. Teir hava tikið seg eitt pláss uppeftir.

Besta fótbóltslandsliðið í Norðurlondum eiga danskarar. Danmark er framvegis nummar fimtan. Svøríki er numar 20, Noreg nummar 38, Finnland er nummar 49 og Ísland er nummar 79. Teir eru dotnir fýra pláss aftur síðsta mánaðin.

Av tjóðunum, sum Føroyar eru í HM undankappingarbólki við, er Frakland best fyri. Hóast tað ikki gekk meiri enn passaligt í EM endaspælinum fyrr í summar, so verður Frakand framvegis mett at eiga næstbesta fótbóltslandsliðið í heiminum. Írland er nummar sekstan, Ísrael nummar 62 og Kypros nummar 104.

Størsta skarvslopið rætta vegin síðsta mánaðin er tað hjá Grikkalandi. Nýklæktu europameistararnir eru nú á 14. plássinum. Fyri einum mánað síðani vórðu teir roknaðir at vera nummar 30.

Brasilia vann fyri stuttum suðuramerikanska meistaraskapin. Tí er tað ikki óvæntað, at teir framvegis eru ovastir á listanum. Spania heldur tørn um triðja plássið, meðan Argentina og Kekkia eru flutt eitt pláss upp, og Holland er flutt tvey pláss niður og nú er á sætta plássinum.

# Cross-renning verður í Nólsoy leygardagin 7. august

Leygardagin 7. august verður skipað fyri rennikapping í Nólsoy í samband við Ovastevnuna.

Kappast verður í sonevndari cross-renning. Runnið verður í haganum sunnanfyri bygdina.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Kappast verður í somu bólkum, sum hava verið nýttir í Grand Prix kappingini í summar.

Kappingin byrjar kl. 16.00. Kappast verður í hesi røð:

Gentur og dreigir -7 (f. 97-) renna 500 m

Gentur og dreingir -10 (f. 94-96) renna 500m

Gentur og dreingir -13 (f. 91-93) renna 1 km

Gentur og dreingir -17 (f. 87-90) renna 2 km

Vaksin (f. 59-86) og veteranar (f. -58) renna 5 km

Tilmelding fer fram á www.athletics.fo í seinasta lagi fríggjakvøldið kl. 21.00. Til ber eisini at melda til á staðnum kappingardagin.

Luttøkugjaldið er kr. 50,- fyri vaksin og kr. 20,- fyri børn. Tað verður goldið, tá startnummarið verður avheintað í nánd av startinum hálvan tíma undan kappingini.

Nr. 1, 2 og 3 í øllum bólkum fáa heiðursmerki. Handanin fer fram í Geilini uml. kl. 18.00.

## Hans Backe fyri bakkasti

FC Keypmannahavn tapti í gjárkvøldið stórt í einum dysti, sum teir sjálvir hildu var mest sum ein avgreiðslu-spurningur. FCK tapti heili 5-0 móti NK Gorica í Parkini í Keypmannahavn.

Venjarin hjá FCK, Hans Backe, sigur, at hetta er tað ringasta, sum hann nakrantíð hevur upplivað sum venjari. Hann er annars júst kosin ársins venjari.

Tapið í gjárkvøldið merkir, at FCK má veittra farvæl til Champions League — nakað sum ikki minnir sørt um sárini hjá Brøndby og teirra kollaps, tá teir taptu 6-1 móti Esbjerg í fyrsta dystinum í fjør. Brøndby kom ongantíð ordiliga fyri seg aftur, og meistarheitið endaði eisini hjá FCK.

Spurningurin er so, um tapið hjá FCK í gjárkvøldið fær eitt líknandi eftirspæl.

## Ljungberg til Italia

Tað gongur ikki serliga væl hjá Arsenal fyri tíðina. Patrick Vieira er um at fara til Real Madrid, og nú verður Fredrik Ljungberg settur í samband við fleiri italiensk feløg. Sambært the Sun eru bæði Roma, Juventus og Inter áhugaði í svenskaranum, og trupult verður helst hjá Arsenal at siga nei til eitt boð upp á 160 milliónir krónur.

## Millar viðgongur doping

Enski súkklarin David Millar viðgongur nú, at hann hevur dopað seg. Mikudagin bleiv hann bannaður frá øllum súkklukappingum í tvey ár, tí at hann er funnin sekur í at hava nýtt dopingevni EPO, sum er víðagitið innan súkklingina.

Eftir at hava verið avhoyrdur av fronsku løgregluni í tveir dagar, viðgekk Millar, at hann hevði tikið EPO bæði í 2001 og 2003. David Millar vann í fjør heimsmeistarakappingina í einkultstarti, men hetta heitið er nú tikið frá honum, eisini er hann tveittur av olympiska liðnum hjá bretum.

## Eriksson bíðar í spenningi

Enski landsliðsvenjarin, Sven Gøran Eriksson, fær í dag at vita, um hann framhaldandi kann rópa seg enskan landsliðsvenjara. Eriksson hevur verið innblandur í einari gølu, har tað er komið fram, at bæði Eriksson og fyrrverandi stjórin fyri enska fótbóltssambandinum FA, Mark Palios, hava havt kynsligt samband við ein skrivara í FA. Palios hevur sagt seg úr starvi, og leiðslan í FA hevur biðið Eriksson á fund á einari loyniligari adressu í London, har endalig støða verður tikin til málið.

## Gravesen til Liverpool



Sambært BBC er Liverpool FC áhuga í at keypa Thomas Gravesen. Danski landsliðsspælarin hevur eitt ár eftir av sáttmálanum við Everton.

– Vit hava hoyrt slatur um Gravesen, men managarin vil helst hava hann í Everton, sigur ein talsmaður í Everton við BBC.

John Sivebæk, umboðsmaðurin hjá Gravesen, er heldur ikki settur í samband við Liverpool.

– Eg havi ikki hoyrt nakað, men tað kann jú koma seinni, sigur Sivebæk, sum sigur, at fleiri toplið eru úti eftir Gravesen.

Gravesen er verdur einar 40 milliónir krónur. Ein skifti til annað felag verður mett at vera sannlíkt.